# Nøvn

## Føðingar



*2. februar fingu Crista og Bárður Mikkelsen, Vági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3220 gr.*

---

14. februar fingu Sølva Heinesen og Sveinbjørn Olsen, Argjum, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2450 gr.

20. februar fingu Jóhanna Bjarnadóttir Andreassen og Leivur Borðoy, Norðskála, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2800 gr.

23. februar fingu Esther Ryggshamar, Leirvík, og Jógvan Gerðalíð, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3775 gr.

25. februar fingu Tórgun og Hans Petur Lamhauge, Skála, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3545 gr.

25. februar fingu Sólgerð og Mortan Joensen, Argjum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4200 gr.

28. februar fingu Eyðna Norðfoss, Runavík, og Alfred Wøldike, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3780 gr.

1. mars fingu Hertha og Hans Ravnsfjall, Sandavági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3700 gr.

1. mars fingu Ragnhild og Petur Sigurd Justesen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4000 gr.

2. mars fingu Jenny Hansen og Atli Gregersen, Norðragøtu, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4865 gr.

2. mars fingu Eva Gudmundsen og Fróði Clementsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2820 gr.

2. mars fingu Joan Djurhuus og Sune Dam Frederiksen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4225 gr.

# Kjak



**Dávid Isfeld**
*Hósvík*

## Lúgva føroysk oljufeløg?

Eingin prístillaging. Fyri uml. einum ári síðan gramdu føroyingar seg um oljuprísirnar í Føroyum. Orsøkin til ónøgdina millum fólk var tann, at prísurin á oljuni fyri tunnuna fór niður, meðan prísurin í Føroyum stóð í stað. Frágreiðingin var at hoyra í eini samrøðu í útvarpinum við ein stjóra í føroyskum oljufelag (minnist ikki hvør hann var, men oljufeløgini siga og gera tað sama), og frágreiðingin var, at oljuprísurin í Føroyum ikki lækkaði við prísinum fyri tunnuna, tí at teir keyptu inn í stórum nøgdum og máttu tískil selja olju og bensin fyri tann prís, teir høvdu givið fyri oljuna, tá hon varð keypt.

Nú er prístillaging. Hesar síðstu vikurnar hava vit sæð olju- og bensinprísirnar fylgja oljuprísinum fyri tunnuna. Hvussu ber tað til, at áðurnevnda grundgeving fyri støðugan prís – vegna prísin á innkeypinum – ikki er galdandi nú, tá ið prísurin støðugt hækkar? Hví fylgja oljuprísirnir í Føroyum við dag frá degi, tá ið prísurin er treytaður av innkeypsprísinum? Lúgva føroysku oljufeløgini, Magn og Effo, fyri at sleppa undan at lækka prísirnar, tá teir eiga at lække, meðan oljufeløgini fylgja príshækkingunum við ódámligum ídni, tá prísurin fyri tunnuna hækkar?

Við vón um opinleika og sannleika

---



**Árni Jakobsen**

## Skal makrelkvotan bjóðast út?

*Ja, um man hyggur eftir leistinum sum borgarligu flokkarnir hava valt fyri onnur økir í Føroyum, so skal alt bjóðast út!*

Tað rættasta man vera, at makrelkvotan verður boðin út alment í Norðanlondum. Ivasamt er, um førleikin til at standa fyri einum útboði av makrelkvotunum er til staðar í Fiskimálaráðnum ella á nøkrum øðrum føroyskum stovni.

Tí er rættast at fáa eitt útlendskt, helst norskt advokatfelag at skipa fyri útboði av føroysku makrelkvotunum.

**Fyri at luttaka í kappingini, skal greining gerast, ið lýsir:**

- Hvør skiparin er, og hvørjar førleikar hann hevur
- hvør manningin er, og hvørjar førleikar manningin hevur
- hvørji tól og hvørjir hættir skulu brúkast
- hvussu úrslitið fíggjarliga hevur verið seinastu 3 árini, og hvussu fyritøkan annars er fyri fíggjarliga.

Trú og heiðurváttan skal leggjast við at tryggja, at tað almenna ongi krøv hevur í felagnum, sum ikki eru hildin.

3 feløg verða vald út í fyrsta umfari, ið síðani kunnu kappast víðari um endaliga at vinna sær rættin til kvotuna.

**Hesi 3 kunnu fyri egna rokning gera nágreiniliga ætlan fyri:**

- hvussu fiskast skal, hvar og nær
- hvønn marknað seljast skal til
- hvørji samfelagsvirði spyrjast burturúr.

**Meginreglan, fyri hvør vinnur útbjóðingina skal vera**

- hægsti prísur
- royndir
- flest møgulig skip.

Úrslitið verður helst, at mest sum allar makrelkvoturnar verða tillutaðar norskum, donskum ella íslendskum reiðaríum.

Tey kunnu lata hægsta prísin og hava flest skip.

Royndir innan føroysk viðurskifti hava millum lítlan og ongan týdning. Tað kann vinnarin altíð fáa við at spyrja seg fyri.

**Dømi omanfyri lýsir júst støðuna sum føroyska byggi- og ráðgevaravinnan er í ídag.**

- Byggiverkætlanir verða gjørdar av útlendskum feløgum
- Verkætlaninar vera projekteraðar av donskum feløgum við føroysku feløgunum sum taskuberarar
- verkætlanin í Marknagili verður ídag í stórstan mun projekterað í Danmark
- Verkætlanin at leingja flogvøllin varð projekterað í Danmark við føroyingum sum taskuberarar
- Seinasta verkætlanin sum er aktuel er útbygging av terminalinum í Vágum
- Har kappast 4 samtøk, 2 føroysk við útlendskum taskuberarum og 2 donsk við føroyskum taskuberarum.

Tað er stór skomm at føroyskir politikarar, ikki taka størri atlit til at stuðla undir eina vitanarvinnu sum ráðgevaravinnan er, fyri at nøra um og menna tað sum kann lata seg gera í Føroyum.

Eisini fyri at fáa fleiri væl útbúgvin fólk aftur til landið.

Seinastu tvey árini er ráðgevaravinnan niðurlaga við umleið 30-40 fólkum, sum svarar til 1/3 av samlaða samlaðu ráðgevarvinnuna.

Ráðgevaravinnan er uppbygd yvir nógv ár og nógv føroysk servitan er á økinum. Harmiligt er, um hon fer fyri bakka.

Vónandi fáa landsstýrisfólk, býráðs- og landspolitikarar eyguni upp fyri hesum, áðrenn ov seint er.

Kann nakað gerast fyri at tryggja føroysku byggivinnuna eina framtíð?